# Árliga ársfrágreiðingin hjá skúlastýrinum 2013

Tvøroyrar- og Trongisvágs skúli

# Starvsfólkahópurin og tal av næmingum

- Tað starvast 29 lærarar í skúlanum, 2 stuðlar, 2 skúlatænarar og 1 heilsufrøðingur.
- Tað eru 277 næmingar.
- Við skúlaársbyrjan fingu 2 lærarar, sum hava verið í tíðaravmarkaðum størvum, fast starv.
- Umframt blivu 2 nýggir lærarar settir í tíðaravmarkaði størv.
- Í desembur byrjar aftur ein nýggjur lærari í tíðaravmarkaðum starvi.
- 1 lærari fór frá við eftirløn í oktobur.
- Í desembur fer so aftur ein lærari frá við eftirløn.

# Høvuðsarbeiðsøkini hjá skúlastýrinum eru ásett í § 52 og 53 í Løgtinglóg nr. 125

## § 52, stk. 1 - 4

- Hevur eftirlit við virksemi skúlans
- Tekur avgerð um øll viðurskifti, ið ikki eru løgd undir kommunustýrið, leiðara skúlans ella aðrar myndugleikar
- Ummælir árligu fíggjarætlaninina
- Leggur øll mál fyri kommunustýrið, sum bera fleiri útreiðslur við sær enn ásett í fíggjarætlanini
- Viðgerð saman við kommunustýrinum uppskot um skúlabygging/umbygging
- Ger uppskot um skúlabygnað kommununnar og broytingar í honum

## § 53, stk. 1 - 6

- Ásetur meginreglur um:
- Undirvísingarætlan skúlans
- Arbeiðsbýtið millum lærarar og vikuætlanina
- Samarbeiðið millum heim og skúla
- Fráboðan til heimini um úrtøku næminganna av undirvísingini
- Næmingafráverur
- Foreldrafundir, felagstiltøk fyri næmingar í skúlatíðini, seturskúla, starvspraktikk o.a.

# Limir í skúlastýrinum, sum hevur virkað síðan 1. januar 2013

## Foreldraumboð

- Súsanna Bertholdsen
- Gunnbjørg Guttesen
- Elin Jacobsen
- Eyð Berg (eykalimur)

## Onnur umboð

- Hallur í Heiðunum, umboð fyri kommununa
- Bjarni Hammer, umboð fyri kommununa
- Dávið Jacobsen, læraraumboð
- Skúlastjórin er fastur skrivari, men hevur ikki atkvøðurætt

# Heimildir hjá skúlastýrinum

- Skúlastýrið er eftirlitsmyndugleiki og fyri at hava eftirlit, mugu vit eisini hava innlit.
- Skúlastýrið hevur tí rætt at biðja um allar viðkomandi upplýsingar til tess at tryggja sær, at virksemi skúlans er á haldgóðum støði bæði fakliga og sosialt.
- Skúlastýrið eigur eisini at fáa kunning um serlig viðurskifti, og kann sum eftirlitsmyndugleiki í samstarvi við skúlan virka fyri at finna eina loysn, um trupulleikar eru í skúlanum.
- Skúlastýrið er *ikki* kærumyndugleiki, og hevur ikki heimild at viðgera persónsmál, hvørki hjá lærarum ella næmingum.

# Framhald....

- Skal ummæla øll mál viðvíkjandi skúlanum, sum kommunustýrið tekur avgerð um.
- Hevur rætt at ummæla øll mál, ið viðvíkja skúlanum og gevur ummæli í øllum málum, sum kommunustýrið og landsstýrismaðurin leggja fyri tað.
- Góðkennir eftir tilmæli frá námsfrøðiliga ráðnum teir undirvísngarmiðlar, skúlin skal brúka, herímillum eisini teir, ið skulu vera í skúlabókasavninum.
- Ger við støði í ásettum reglum atferðarreglur skúlans og reglur um umsjónina við næmingunum í skúlatíðini.
- Samstarvar við onnur skúlastýri í økinum um at stimbra og menna skúlaskapin í økinum.

# Virksemi hjá skúlastýrinum seinasta árið

- 11 vanligir skúlastýrisfundir.
- 2 umboð vóru til aðalfundin hjá felagnum “Heim og skúli”.
- 1 fund við býráðið.
- Gunnbjørg er limur í skjóttarbeiðandi nevnd, sum býráðið hevur sett at arbeiða við framtíðar skúlabygnaðinum á Tvøroyri. Nevndin hevur havt 4 fundir.
- 4 fundir í skúlagarðsbólkinum.
- 2 garðdagar.
- 3 umboð vóru til ráðstevnu fyri skúlastýrislimir, sum felagið “Heim og skúli” skipaði fyri.
- Setan av nýggjum lærarum og stuðlum til skúlan.

# Hvat er so komið burturúr virkseminum?






# Nýtt innbúgv er í øllum floksstovunum í Tvøroyrar skúla.

**Beint eftir nýggjár kemur nýggja innbúgvið til floksstovurnar í Trongisvágs skúla.**



# Handverkarar eru í holt við at skifta klædning og vindeygu.

Partur av “gamla” skúla á Tvøroyri.



# Økið vestan fyri sparkivøllin er loksins innigyrt.

Nýtt stakitt er sett upp, og ein læstur bummur forðar bilum at koyra inn á økið, sum nú er skúlagarður burturav.



# Garðdagur í Trongisvági

Sum áður nevnt, so hava vit skipað fyri 2 garðdøgum - bara í Trongisvági ár.



# Garðdagur

Børnini vóru ófør at hjálpa til og eru sera glað fyri tað, sum er komið burturúr hagartil.



# Garðdagur

Í skúlagarðsbólkinum er bæði foreldur og lærarar. Skúlagarðsbólkurin hevur eina játtan uppá 100.000 kr. árliga. Hetta er annað árið á rað, at vit hava fingið hesa játtan.



# Garðdagur

Hendan dagin bleiv ein partur av fótbóltsvenjingini vesturi á nýggja vøllinum avlýst, tí børnini vildu heldur hjálpa til í skúlagarðinum.



# Garðdagur

Her eru tað “kolbøtte” stengurnar, sum skulu riggast til.



# Fríkorter

Tað er kavið og kalt, men tað forðar ikki børunum í at stuttleika sær úti í fríkorterinum.



# Partur av nýggja klatriteltinum

Hetta er úrslit av einum samstarvi við Tekniska skúla í Havn. Næmingar á timburdeildini hava smíðað klatriteltið og fingu eina lítla samsýning afturfyri. Vit hava sjálvandi goldið fyri tilfarið av okkara árligi játtan. Á henda hátt røkkur peningurin nógv longri. Teltið er klárt at seta upp og verður hetta gjørt í næstum. Vit bíða eftir veðrinum.



# “Gamli” skúlagarður

Í fjør høvdu vit garðdagar í Tvøroyrar skúla. Eisini har hava vit lagt dent á at skapa ein spennandi skúlagarð við avbjóðingum og rørslumøguleikum av ymiskum slag. Hetta er “Super Nova”.



# “Gamli” skúlagarður

Hetta eitur “stong tennis” og er væl umtókt. Tað kunnu bert 2 spæla samstundis, so vit hava bílagt tvær avtrat.



# “Kolbøtte” stengur

Eisini í “gamla” skúlagarði eru “kolbøtte” stengur við fallundirlagi. Tær eru gjørdar á verkstaðnum hjá Bærendsen og ætla vit at fáa fleiri av hesum.



# Nýtt vindeyga við úthurð

Hetta hevur verið ávegis í fleiri ár og loksins er tað komið; aftur eitt flugubein á umvælingarlistanum.



# 30 nýggjar farteldur hevur kommunan játtað skúlanum

Teldurnar verða goymdar í hesum báðum telduvognunum, sum standa í Trongisvági. Umframt hevur skúlin 12 farteldur, sum just eru uppdateraðar, so tilsamans eru 42 farteldur.



# Teldustovan í Tvøroyrar skúla

Skúlin er sera væl útgjørdur á tøkniliga økinum. Hetta var eisini at hoyra í Kvf 10/11, har samrøða var við Johan í samb, við krøv um útgerð og talgildar próvtøkur. Okkara skúli er undangongu skúli á hesum øki.

# Trivnaður, samstarv, samskifti og álit

- Eru lyklaorð í skúlastýrinum, sum tíðum eru uppi og venda á okkara fundum.
- Fleiri ferðir hava vit gjørt vart við, hvussu umráðandi tað er, at samskiftið millum heim og skúla er nøktandi.
- Tá tað er møguligt, má skúlin boða frá í góðari tíð, um næmingarnar fáa frí.
- Serundirvísingin – at heimini verða betur kunnaði um serundirvísingina hjá hvørjum einstøkum barni.
- Í hesum samb. verður framyvir skipað fyri einum foreldrafundi, sum serliga er ætlaður foreldrum, hvørs børn fáa serundirvísing. Lærarar, sum taka sær av serundirvísngini, verða við til fundin.

# Framhald.......

- Skúlin hevur eina heimasíðu, sum eftir okkara tykki, er heldur ótíðarhóskandi. Arbeitt verður við at menna eina nýggja heimasíðu.
- Allir flokkar hava eisini hvør sína heimasíðu. Á heimasíðuni hjá flokkunum liggur m.a. vikuætlan, har heimasetningurin kann síggjast.
- Fundarskrá og gerðabók hjá skúlastýrinum skulu liggja á heimasíðu skúlans, so øll hava møguleika at fylgja við. Hetta er krav sambært reglunum fyri øll skúlastýri.
- Á henda hátt verður tað eisini lættari hjá tykkum foreldrum at fylgja við í skúlastýrisarbeiðnum.
- Í samstarvi við Suna Petersen, lærara á miðnámsskúlanum, eru vit farin í holt við at fyrireika nøgdsemis- og trivnaðarkanningar. Nøgdsemiskanningin verður millum foreldur og trivnaðarkanning skal gerast bæði millum lærarar og næmingar.
- Vónandi verður úrslitið av hesum kanningum klárt at leggja fram á næsta felagsforeldrafundi. Tað hava vit sett okkum fyri!

# Samstarv

- Okkara samstarv við leiðsluna er sera jaligt. Vit eru ikki altíð samd, men megna altíð at tosa virðiligt um ósemjur og møguligar loysnir.
- Við kommunina - serliga mentanarnevndina, sum varðar av skúlanum - hava vit eitt samstarv, sum er merkt av vælvild, áhuga og virkisfýsni. Hetta takka vit fyri og vilja gera okkara til, at hetta heldur áfram.
- Í samband við nýggja innbúgvið, hevur mentanarrnevndin játtað skúlastýrinum at taka stig til samstarv við ein ergoterapeut, Biritu Thomsen. Hon hevur verið í nærum øllum floksstovum, har hon hevur vegleitt næmingunum í at innstilla stólarnar og undirvíst teimum í røttum arbeiðsstøðum. Hetta heldur áfram og verður ein fastur táttur hvørt ár við skúlaársbyrjan.
- Eisini fegnast vit um, at kommunan hevur sett eitt starvsfólk 40 tímar um mánaðin at taka sær av viðlíkahaldi í skúlagørðunum og av økjunum rundan um skúlarnar báðar. Viðlíkahald hevur verið eitt afturvendandi punkt á fleri skúlastýrisfundum.

# Samstarv

- Vit hava viðgjørt onkur mál í skúlastýrinum, sum foreldur hava vent sær til okkara við t.d. foreldur, sum hava verið ørkymlaði um ov lítla kunning í samband við serundirvísingina.
- Just nú arbeiða vit við at skipa fyri einum skeiði í oynni fyri lærarar, sum hava næmingar við ADHD. Hetta verður gjørt í samstarvi við skúlastýrini í oynni og verður gjørt eftir áheitan frá einum foreldri.
- Foreldur, sum venda sær til skúlastýrið, skulu hava álit á, at tey verða hoyrd og tikin í álvara.
- Øll mál verða viðgjørd í trúnaði
- Vit ætla nú at fara eitt stig víðari í samstarvinum við tykkum foreldur.